DAGSINS MEINING

Pengasorgir

Tað stendur væl til í Føroyum fíggjarliga. So væl, at meira enn hálvtfjórðhundrað milliónir skulu skarvast av blokkinum næsta ár. Hettar vil í hvussu so er samgongan verða við.

Er hettar nú støðan? Andstøðan og onnur hava fært fram, at stóra avlopið á fíggjarlógini hvørt ár partvíst skyldast útsettar íløgur sum fara at koma óansað hvussu víkir og vendir. Hesar íløgurnar liggja innan samferðsluøkið, skúlaverkið og ikki minst innan almanna og heilsuøkið.

Vit hoyra hvønn dag um hvussu almanna og helsuøkið verður skert. Fólk, ið hava hjálpartól fyri neyðini fáa ikki ta tænastu, ið sømir seg fyri eitt land, ið rópar seg vælferðarsamfelag. Landsjúkrahúsið hevur í nogv ár stongt deildir í summarfrítíðini, og bygningar og annað er farið at eldast. Flestu skúlar í landinum liva ikki upp til krøvini í nýggju fólkaskúlalógini og skipini hjá Strandferðsluni eru tey flestu gomul og hava tænt væl og virðiliga fyri seg.

Í nítiárunum var íløgusteðgur, tí kreppa var, og pengar vóru ikki til taks. Nú hava vit ráð til endurnýggingar, men verða hesar útsettar, tí búskapartølini skulu síggja pen út fyri fullveldið. Íløgutørvurin fer ongan veg og gerst heldur størri, longur vit útseta hesar íløgur. Nýtt landsjúkrahús, ferjur, undirsjóvartunnil til Norðoyggjar, ajourføring av almannaverkinum o.s.fr. eru íløgur fyri milliardir.

Føroya Landstýri stendur nú framman fyri hesum risaíløgum, ið skullu gerast óansað hvussu víkir og vendir — skipini kunnu ikki sigla til tey verða 100, verandi landsjúkrahús, ið hevur á leið 30 ár á baki gerst heldur ikki yngri.

Hvat ger landstýrið við hettar? Jú teir skarva hálvtfjórðhundrað milliónir av blokkinum, og fara so at kjakast um, hvørt nýggi Smyril skal fara av íløgukarminum ella ikki. Landstýrið kundi betalt nýggju Suðuroyarferjuna kontant, uttan at borgarin merkti nakað, um teir einans útsettu niðurskurðin av blokkinum í eitt ár. Eitt Suðuroyarskip hitar ikki føroyska búskapin stórvegis, tí tað verður bygt uttanlands. Tí eru góð argumentir fyri at halda tað uttanfyri íløgukarmin, um tað verður goldið av pengum man ætlar at senda retur til Danmarkar ella geva avkall uppá allíkavæl.

Landstýrið skumpar við blokkniðurskurðinum, ið teir snilt fremja allarseinast í valskeiðnum, allar pengasorgir á næstu samgongu, ið kemur at hava tí torføru og óivað ópopuleru uppgávu at fáa komandi fíggjarlógir at balansera við milliardaíløgum fyri framman og færri pengum.

Sosialurin

Minningarorð

Hugsjónarliga viðfarið royndist

Marita føddist og vaks upp í einum javnaðarheimi, har politikkur, og politiskar støðutakanir vóru partar av gerandisdegnum, og har humanisma, samhaldsfesti, rættvísi og rættferð, vóru hornasteinar at grunda samveru ímillum manna á, tað samveru, sum gav størsta mát av frælsi og vælferð til hin einstaka og møguleika fyri størsta máti av nøgdsemi og lukkukenslu.

Marita hevur fleiri ferðir greitt frá, at hon, júst tí at hon ikki bert vildi arva javnaðarhugsjónina, sum ein sjálvsagdan part av førninginum heimanífrá, fleiri ferðir á lívsvegi sínum varð steðgað á til tess at granska seg sjálva fyri at vinna út av, um justeringar skuldu fremjast, kósir broytast, okkurt tveitast fyri borð og annað takast inn.

T.d táið hon fyrstu ferð skuldi velja í øðrum landi, og táið hon heimafturkomin til Føroya skuldi taka støðu til tann føroyska politiska mosaikkin, sum var ein serliga fløkt og fjøltáttað mynd.

Hon kom hvørja ferð til at støðu, at tey lívsvirði, sum ein samfelagsskipan skal tryggjað, røkkast frægast í einum samhaldsføstum demokratiskt sosialistiskum samfelagi.

Heimið hjá Maritu og Kára og umhvørvi teirra gjørdust tí eitt av teim, har ætlanir vórðu fostraðar, viðgjørdar og førdar í penn. Har stevnuskráir, arbeiðsstetningur og samgonguskjøl komu upp at venda og ikki minst, har vit, sum vald vóru í álitisistørv, kundu styrkja okkum av kjaki um veikleikar og styrki í teimum ymsu politisku tættunum, uppi vóru.

Hetta at bera í gerandisdegnum, røkka limum, fyriskipa í felagum og floksapparati og síðani sannføra veljaran er aðaluppgávan og lá teirra partur ongantíð eftir, men onkur skal harútyvir átaka sær formligu leiðsluna og standa í fremstu rød.

Kenni meg sannførdan um, at tá ið Marita í 1988 at enda játtaði at stilla upp, so var tað ein ásannan av, at tú mást ganga undir ávísa verjuskyldu, skalt tú røkka longst møguligt, eisini at egnum málum.

Og Marita røkk langt tey 10 árini, hon stóð í fremstu rød, á tingi, í landsstýri og aðrastaðni.

Eitt av hennara hjartamálum var javnstøða ímillum kynini. Sjálvsagt fyri ein javnaðarflokk at fremja lóggávu um um hetta. Men, hvussu ótrúliga nógv sterkari er tað ikki at hava eina kvinnu at stríðast saman við, ið framhaldandi kann standa sum fyrimynd fyri ikki bert aðrar kvinnur, men øll, sum halda at rættvísi er javnstøða ímillum kynini og í breiðari merking, ímillum menniskju.

Skipanin av landsstýri í januar í 1991 var nokk so serlig, tí løgmaður skuldi fara frá við ársskiftið 1992/93.

Tí sluppu vit ikki undan, at ímillum manna vildi tilnevningin verða fatað, ikki sum val av einum løgmanni og trimum landsstýrismonnum, men sum val av einum løgmanni og trimum løgmansevnum, og soleiðis bleiv tað eisini.

Flokkurin valdi Maritu at taka við, og í dag tykist tjóðin samd um, at tað var eitt gott val.

Tað er við størstu virðing og takksemi, tjóðin nú heilsar Maritu farvæl seinastu ferð.

Hennara sigling í vandsjógvi í 1993 og 1994 skapti viðurkenning frá øllum politiskum flokkum í Føroyum og eisini stóra virðing uttanfyri landoddarnar.

Ágrýtni, viljastyrki og støðufesti vóru ímillum teir eginleikar, sum góvu Maritu førleika at standa á odda, ta truplu tíð, men hesar eginleikar hevði hon avdúkað áðrenn.

Hugsi um, at hon í búnum aldri aftaná at hava fingið sær eina útbúgving, fór undir hægri lesnað einaferð afturat. Tað er ikki hvørsmansføri, vit allarflestu vildu mett hetta ov møtimikið. Og tað, tó hon samstundis hevði eitt heim heim við manni og trimum børnum at eiga medábyrgd av.

Undirritaði hevur, sum tað framgongur, nógv at takka fyri, táið ein hevur átt so góð fólk at stríðast saman við politiskt, men áðrenn hetta verunliga tók seg upp í 1970, eru so nógvar privatar upplivingar frá eini felags fortíð, lestrarárini í Danmark, at minnast til. Tey minnini fløva í dag, eins og tann meiri privata samveran, sum tað hóast alt blivu nakrar stundir til hesi 31 árini heima í Føroyum.

Farvæl stríðsfelagi, og tit, Kári, synir og familja eiga djúpa samkenslu úr okkara húsi.

Atli P. Dam

Ágrýtni, viljastyrki og støðufesti vóru ímillum teir eginleikar, sum góvu Maritu førleika at standa á odda í truplum tíðum, men hesar eginleikar hevði hon avdúkað áðrenn, skrivar Atli P. Dam, fyrrverandi Løgmaður í minningarorðum um floksfelagan, Maritu Petersen, sum doyði sunnudagin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[30]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Føroyingar lívshættisligt lívshóttalag!

Hans Birgir Hansen

Tað er lívhættisligt at liva í einum kemiskum upplýstum samfelagi og undir følskum lívstreytum og byggja landshúsarhaldi á mórubotn, ið hvørvir undan øllum í dag!

Tað er lívshættisligt tá føroyingar liva og virka skeivt í dag uttan mun til høgur ella lágur í samfelagsskipanum tá hugsað verður um kemisk evnir ið skaða heilsuna!

Tað er lívshættisligt at vera autoritets/góðtrúgvin við fórdómum/vanabundnari hugsan/traditiónum og lata seg villeiða av øllum autoritetum kring alt landið!

Tað er lívshættisligt at liva einstáttað fyriskipað lív sum kapitalistiskur trælur hvat øll fjøtrað/heiladálka/vaskað/indoktrineraðgera óheft/heft av samkomum!

Tað er lívshættisligt at vera bundin av skaðiligum heilivági við ella uttan resept frá kommunulæknum tit keypa á føroyskum apotekum, ið skuldu verið stongd!

Tað er lívshættisligt at drekka/rúsdrekka og fáa narkotisk evnir og roykja sigarettir/sigarir fleiri ferðir dagliga, ið oyðileggur lív og heilsu kring alt landið!

Tað er kostnaðarmiklar viðgerðir fólk fáa á føroysku sjúkrahúsunum vit kunna spara tí almenna at fíggja við at broyta lívshættisliga lívshóttalagi!

Tað er við at fáa fjøltáttaðan kost og kosttilskot og dagliga motión við at spáka/smárenna ein túr tíðliga á morgni ella á kvøldi, ið gevur góða konditíon!

Tað eru fleiri heilsubløð øll kunna lesa á bókasøvnum ella keypa slík í blaðkioskum kring alt landið og í Havn so øll kunnu fáa ta neyðugu kunningina!

Tað er nógvir pengar at spara við at hava nóg sterkan vilja til at broyta lívshættisliga lívshóttalagi!

Sannleikin illa lýddur?

Hans Birgir Hansen

Eg havi altíð verið illa lýddur, tí ein hevur greitt nógvar sannleikar/veruleikar frá lívsins harða skúla/lívsroyndum ein hevur greitt frá í túsundtals lesarabrøvum!

Eg haví øllum kjaki roynt at skapa innlit/forstáilsi/tilvitan um samanhangandi skipanir/lógir/mannagongdir/kunngerðir/reglugerðir øllum miðfyrisitingum!

Eg havi sæð nógv vera tikið upp eftir einum frá kjakinum/hugsjónarliga/-málsliga seinastu nógvu árini og ein verður fylgdur upp av øllum umheiminum í dag!

Eg havi verið undangongumaður á tí hugsjónarliga/málsliga tá hópin av føroyingum fylgja við hvat ein tekst við ein greiðir frá í túsundtals lesarabrøvum!

Eg havi nógv at stríðast fyri soleingi einum verður lív lagað at føra út í lívið, at allir føroyingar og alt fjøltáttað virksemi skal skipast sjálvstøðugt um landi!

Eg havi skapt nógv hugtøk/málsligar orðingar í ein sær í bløðum/loftmiðlum og úti ímillum manna verður endurtikið øll nýta í tí dagliga samskiftinum!

Eg havi sostatt lagt alla kropsliga orku/tíð/pening í at fáa klára upp við arvafíggindar/daglig fyribrigdir/fortíð/nútíð/ og skapa tryggari framtíð um landið!

Eg havi stríðst ímóti øllum arvafíggindum/-bygdar/býar/havnarfólki/myndugleikum/valdum við fleiri, ið ikki viðgera medmenniskju/viðurskiftafólki eins!

Eg havi fleiri stríðsmál og áhugamál at røkja í tí dagliga lívinum ið kemur at forbedra/kollvelta øll etablerað lívsviðurskifti og fjøltáttaða virksemi!

Eg havi víst til broytingar í lívshóttalagi/arbeiðslagi/vil geva øllum føroyingum betri heilsu/økta vælveru/eyka orkutilskot til dagliga arbeiðslívið!

Eg havi víst til náttúru/umhvørvis/djóra/plantuvernd/nýggja orkusparandi teknologi V. H. Flach!

Arbeiðandi verkafólki kúgandi trælir!

Hans Birgir Hansen

Tað er ólukksáliga órættvíst skipað innan ráðandi kreftir við hvør sínum heiti, ið stýra politisku skipan/myndugleikum/valdum í Havnini!

Tað er tá ein vísir til diktatur/facismu/hernaðar/politistatir/einaræði/tvangsskipan/ vit hava í dag úti á arbeiðsmarknaðum kring landið!

Tað er ikki rættvíst, at arbeiðandi verkafólki skula vera kapitalistiskir trælir, ið liva eina kúgaða lívstilveru við hóttanum yvir høvdið!

Tað er ein andstygd at uppliva hvussu føroyingar fara við arbeiðandi verkafólki, ið skapa lívsgrundarlagið hjá samfelagsbúskapi!

Tað er arbeiðandi verkafólkið kring landið vit øll eiga at sýna størri solidaritet, ið skapa frameiðslu/flutningsvirksemi/samfelagsvirðir!

Tað er meira enn hvat vit kunnu siga um ráðandi kreftir/politisku skipan/myndugleikar/valdir ið fremja skipaðan ágang ímóti teimum!

Tað er betri skipað arbeiðsmarknaðar/fakfelags viðurskiftir, ein hevur gjørt vart við í túsundtals lesarabrøvum, seinastu nógvu árini.

Tað er ræðuligt at arbeiðandi fólkið skal knúgva undir ómenniskjaligum lívskorum hvat hesi ikki hava uppiborði kring landið!

Tað er tíð uppá at sleppa teimum undan framhaldandi at vera kapitalistiskir trælir ið verða kúgaði av arbeiðsgevarum v.fl.!

Tað er ikki rættvíst at aðrir borgarar í samfelagsskipanum yvirvalds/miðalstættir skulu ídag, njóta teirra samfelags ágóða!

Tað er tá vælbjargaðu/múgvandi føroyingar trakka frælsir/rættindir/privatlív undir fótin!

Tú hevur nógvar sterkar síður...

vit eru ein av teimum

Sosialurin

Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum

Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:
10x15 cm. kr. 80,- 18x24 cm. kr. 150,-
13x18 cm. kr. 100,- 20x30 cm. kr. 200,-
15x21 cm. kr. 130,- 30x45 cm. kr. 350,-

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: _____
Síða: _____
Stødd: _____
Mongd: _____

Navn: _____
Bústaður: _____
_____
Telefon: _____